Fimleikur:

# Eitt fimtapláss




*Føroyska fimleikakvinnurnar: Fremst: Marjun Persson, Sarita Heinesen, Anita Knudsen, Marit Magnussen og Anna Hansen.*

**Føroysku kvinnurnar kappaðust í gjár á gólvi og í lopi fyri lið. Tær endaðu á einum samlaðum fimtaplássi**

FIMLEIKUR
*Álvur/Ingrid*

**Guernsey:** Fyrrapartin í gjár, mánadag, var skjøtil settur á fimleikin her á oyggjaleikunum á Guernsey. Føroysku kvinnurnar vóru tær fyrstu sum skuldu í eldin, og var fyrsta kappingin á skránni á gólvinum.

Fyrsta umfarið var avgreitt saman við Ynis Mon, og samanborið við teir fimleikararnar gekk tað stak væl hjá føroysku kvinnunum, sum vóru væl frammanfyri í stigum.

Anna Hansen, Anita Knudsen, Marjun Persson og Sarita Heinesen umboðaðu Føroyar, og høvdu tær eitt flott miðaltal á 8,5 í miðal. Marit Magnussen er skadd í krossbandinum, og er tí ikki við í kappingunum. Hon heilsaði tó uppá dómararnar áðrenn hvørja kapping.

Onnur kappingin á skránni var lop. Har gekk tað ikki eins væl. Í lopi lá miðaltalið beint yvir 7,0.

Vit fingu orðið á føroyska hjálparvenjaran, Marjun Thomassen, beint eftir, at føroysku kvinnurnar vóru lidnar við síni avrik.

– Tað gekk væl hjá okkum, og higartil eru vit nøgd, men vit hava jú ikki sæð hinar fimleikararnar enn, segði Marjun Thomassen.

Úrslitið hjá kvinnunum varð klárt beint eftir middag, og endaðu tær samanlagt á einum vit vinna uppá, sigur Marjun Thomassen, sum tó ikki dylir fyri, at tað er ein smeitur, at Marit Magnussen ikki er við.

– Tað er loyvi at hava fimm fimleikarar við, og fýra verða taldar við. Tá kann ein kiksa, og Marit hevði bara tdrigið liðið uppeftir.

Seinnapartin í gjár fóru føroysku menninir í eldin, og vóru vónirnar frammanundan góðar. Vit megna tó ikki at fáa úrslitið við áðrenn evsta mark, so tað frætta vit meira um í blaðnum í morgin.

– Vit vænta gull hjá monnunum. Og eg ivist ikki í, at fleiri gullmerki og heiðursmerki verða á skránni í einstaklingakappingini. Menninir eru væl fyri. Høgni fekk ein lítlan skaða, men tað er ikki soleiðis, at hann ikki fær verið við hóast tað, segði Marjun Thomassen áðrenn menninir byrjaðu uppá liðkappingina.

Hinir fimleikararnir hjá monnunum eru annars 100% klárir.

– Eg vænti, at vit fara at síggja fleiri heiðursmerki. Eg trúgvi ikki, at hinir fimleikararnir hava tikið seg nógv meira fram enn seinast, sigur hjálparvenjarin at enda.

### Vant nógv

– Fimleikararnir hava eisini vant nógv og miðvíst, og í mun til hinar sum vit kappaðust ímóti beint í áðni, so duga vit tað rytmiska eisini. Tær hugsa eisini um koreografiina, og tað er tað, sum

| Fimleikari | | Gólv | Lop |
|---|---|---|---|
| Anna Hansen | | 8,4 | 7,05 |
| Marjun Persson | 8,5 | 6,8 | |
| Anita Knudsen | 8,5 | 7,25 | |

Samanlagt 62,125 og gjørdist hetta til eitt fimtapláss



*Anita Knudsen fekk 8,5 fyri framførsluna á gólvinum*



*Marit Magnussen er ikki við í kappingunum í ár. Hon er skadd í krossbandinum, og tað er ein dyggur smeitur fyri føroysku fimleikararnar*

## Høgni ikki við

Føroyski fimleikarin, Høgni Øster, var ikki við, tá menninir í fimleiki fóru undir liðkappingina. Hann fekk ein lítlan skaða í fótin herfyri, men hann verður við mikudagin, tá farið verður undir einstaklingakappingarnar.

**-ingrid**

# Sandoyingar tannleysir

**Tað hevur ikki hilnast nakað serligt hjá B71 higartil, og heldur ikki leygardagin, tá ið teir vitjaðu í Klaksvík, fekst nakað í lætta stigapjøkan.**

2. DEILD - KÍ–B71
*Jóannes Hansen*



*Nýggi gambiski framherjin hjá B71, Mustapha KNdaw, roynir her at fara framvið Andriasi Jacobsen hjá KÍ. B71 mátti enn einaferð lúta í landskappingini í 2. deild MYND: Símun á Høvdanum*

Klaksvíkingar hava ikki verið so óførir, sum teir ofta tey seinnu árini hava verið fyrsta triðingin av kappingini. Men hesa ferð eydnaðist teimum at fáa alt.

KÍ legði seg framum, tá ið bara tríggir minuttir vóru farnir. Málskjútti var miðvallarin í vinstru, Marius Nystrøm Hansen. Hann setti fyri opnum máli fótin undir bóltin, eftir at miðvallarin í høgru, David Bertholdsen, hevði umsitið fríspæling frá John Havn rættuliga væl.

Tveir minuttir undan hvíldini økti Erling Fles, sum fyri tað mesta hevur verið í 1. deild, men sum hesa ferð fekk dystarvenjing á næstbesta liðnum. Saman við Arnoldi Joensen var hann í KÍ álopinum. Miðverjin Niclas Niclassen sendi fríspark í brotsteigin, har miðvallarin Fríðin Ziskason royndi seg við stútara. Valdemar Nowisci hálvbjargaði, og so var Erling Fles fyrstur á.

KÍ var rættuliga væl mannað, og tunna B71 liðið hevði ikki nógv at bjóða uppá. Álopsmaðurin Mustapha KNdaw hevði í 2. hálvleiki góða roynd, sum John William Joensen stórbjargaði, men annars var lítið bit í.

B71 formaðurin, Eli Hentze, sum í meiri enn fimtan ár hevur verið millum drívkreftirnar í fótbóltinum á Sandi, varð í 2. hálvleiki settur á vøllin. Tað var hann saman við Pálli á Reynatúgvu. Almannaráðharrin royndi at hjálpa til, men tað segði tað sama. B71 fekk ikki mál, og harvið øktist fjarstøðan í botninum rættuliga nógv til eitt nú KÍ.

Klaksvíkingar løgdu annars í góðveðrinum til merkis, at Drangberg tvíburðarnir, sum hava vant støðugt við KÍ seinastu árini, nú royna seg saman við oyggjafeløgunum í Sandoy. Hesa ferð vóru teir á beinkinum, har Martin var allar 90 minuttirnar, meðan Jógvan varð skiftur inn, tá ið tað restaðu tíggju minuttir.

**KÍ–B71 2–0 (2–0)**
1–0: Marius Nystrøm Hansen 3.
2–0: Erling Fles 43.

# Báðir bogarnir vóru spentir til trý stig

**Hóast tað síðstu løtuna tóktist liggja í luftini, at í hvussu so er eitt mál fór at koma afturat, so endaði tað javnt og harvið við eitt sindur tómari kenslu í báðum legunum**

B68–HB
*Jóannes Hansen*

Báðir partar ætlaðu sær øll trý stigini, og sum 2. hálvleikur leið, góvu báðir partar ábendingar um, at teir vóru sinnaðir at sleppa eitt vet í verjupartinum fyri at fáa týdningarmikla málið, sum hevði borið øll trý stigini við sær.

HB vísti ungu framrættaðu monnunum Rana D. Christiansen og Pálli M. Joensen álit, og hjá B68 varð framrættaði Øssur Jacobsen settur inn fyri meiri verjukenda miðvallaran, Jann Inga Petersen, sum annars hevði røkt sína uppgávu væl. At báðir partar vóru framrættaðir, og at báðir partar samstundis sleptu eitt vet í verjuni, hevði intensitet, dramatikk og harvið spenning við sær í sera undirhaldandi uppgerð, har sannførandi málverjarnir báðir áttu týdningarmiklar leiklutir. Albert Sævarsson og Bárður Johannesen vóru tryggir á strikuni, teir vóru kringir í brotsteiginum, og teir dugdu væl at lesa spælið og at blanda seg upp í uttanfyri brotsteigin, tá ið tað í einstøkum førum var neyðugt.

Adrew av Fløtum, Rógvi Jacobsen og Tór–Ingar Akselsen høvdu møguleikar at avgera HB til fyrimunar, og hjá B68 var Súni Fríði Johannesen, sum var betri upplagdur enn fyrr í ár, meiri enn eina ferð um reppið at gerast leysur. Øssur Hansen royndi við frísparki úr sekstan metra fjarstøðu og mitt fyri. Bólturin streyk dygst uttanfyri stólpan, men síðsta stóra hálva tíman eydnaðist tað ikki at fáa úrtøku, og harvið fóru báðir partar ikki meiri enn hálvnøgdir undir brúsu.

### Meiri grammir

B68 hevur havt trupulleikar at fáa mál, og tað høvdu teir eisini hesa ferð. Men teir vóru meiri ágangandi, enn teir hava verið seinastu ferðirnar. Øssur Hansen var væl upplagdur á miðvøllinum, og tað var sum heild meiri stríðshuga og størri tyngd í, enn tað var, tá ið FS Vágar sunnudagin frammanundan fór av Svangaskarði við øllum stigunum.

At Hans Fróði Hansen var burtur hevði við sær, at Dánial Hansen og Arnbjørn Danielsen vóru miðverjar, og at Jákup Eli Olsen kom beinleiðis úr Danmark, har hann hevur verið knappliga í eitt ár, og á vongverjan í vinstru. Tað var strevið hjá honum, men Jákup Eli brúkti allar sínar royndir.

Í roynd at geva álopspartinum størri tyngd hevði Jóhan Petur Poulsen, sum ofta hevur verið á beinkinum, fingið møguleikan ímillum teir fyrstu ellivu. Unglingaspælarin er sterkur, skjótur og grammur, og hann vísti mest sum beinanvegin, at hann lá inni við løðingini, sum skuldi til fyri at spreingja hurðina upp aftanfyri trygga HB málverjan. Smáir tíggju minuttir vóru farnir, tá ið Jóhan Petur tók søkina í egnar hendur. Úr eitt sindur til vinstru rak hann mitt fyri, og úr umleið 22 metrum smekkaði hann til. Bólturin fór dygst inn undir nærru samankomingina aftanfyri Bárð Johannesen. B68 var á odda, og tað var akkurát tað, sum skuldi til fyri at varðveita spenningin og harvið undirhaldsvirðið.

### Misbrúkti og bøtti um

HB hevur ofta havt trupult við at fáa fulla úrtøku á Svangaskarði. Frá fyrsta bríksli sást í góðveðrinum, at havnarmenninir vóru ikki komnir fyri at luska sær ein verjukendan javnleik við aftur til høvuðsstaðin.

Útgangsstøðan var sera framrættað og kanska eitt sindur óvæntað. Saman við Andrew av Fløtum og Carsten From var Tór–Ingar Akselsen heilt frammi í álopinum, meðan ungi Bjarni Jørgensen hevði fingið møguleikan á vinstra vongverjanum í staðin fyri Janus M. Joensen, sum var sjúkur.

Ivaleyst ætlaði HB, at tað mesta skuldi ganga fyri seg á helvtini hjá toftamonnum, men tað eydnaðist ikki heilt. At B68 var yvirmannað á miðvøllinum hevði ofta við sær, at teir høvdu lættari at finna hvønn annan, enn mótstøðumenninir høvdu tað, meðan B68 verjan ikki kom undir tað trýstið, sum tað kanska kundi roknast við, tá ið mótstøðumenninir vóru so mikið framrættaðir.

Andrew av Fløtum fekk á hálva tímanum risa møguleika at javna til 1–1. Eftir langa sending frá Halli Danielsen, royndi landsliðsmaðurin á baklinjuni at kroysta seg framvið verjuspælara, sum gjørdi tað einasta, sum hann ikki skuldi havt gjørt. Í staðin fyri at verja fyri og harvið trýsta bóltføraran at snara so at siga skeiva vegin, royndi hann at pilka bóltin til sín, og tað tilboðið segði royndi álopsspælarin ikki frá sær. Hann lá sum keylan, dómarin peikaði á ellivu metrar, men Albert Sævarsson tveitti seg til vinstru fyri seg sjálvan og bjargaði royndini, sum Andrew sjálvur tók sær av.

B68 fekk sinniliga yvirskotið, meðan HB kanska fór eitt vet niður. Men í 56. minutti bøtti Andrew av Fløtum um skaðan. Rúni Nolsøe legði flata sending inn um heimaverjuna, Andrew var fyrstur á, helt mótstøðumenninar aftanfyri seg og skoraði.

So var tað, at báðir partar spentu álopsbogan, ferðin var høg, hugburðurin góður og áskoðararnir sótu sum á nálum. Men tað komu ikki fleiri mál.

**B68–HB 1–1 (1–0)**
1–0: Jóhan Petur Poulsen 9.
1–1: Andrew av Fløtum 56.
Dómari Petur Skarðenni
**B68:** Albert Sævarsson – Bogi Petersen, Dánial Hansen, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen – Jann Ingi Petersen (Øssur Jacobsen, 79.), Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, John Heri Dam – Súni Fríði Johannesen, Jóhan Petur Poulsen
**Gult kort:** einki
HB: Bárður Johannesen – Hallur Danielsen, Eli Thorsteinsson, Símun Eliasen, Bjarni Jørgensen – Rúni Nolsøe, Martin Christiansen, Rógvi Jacobsen – Tór–Ingar Akselsen (Páll M. Joensen, 73.), Carsten From (Rani D. Christiansen, 57.), Andrew av Fløtum
**Gult kort:** Andrew av Fløtum (men tað er ikki viðmerkt á dómaraseðlinum!)